# Vánalig ráðgeving til ferðafólk í Føroyum



*Tað var um reppi, at harra og frú Houllier úr Suður-Fraklandi gjørdust ov sein til flogfarið til Aberdeen, tí tey vóru støðd í Klaksvík 1. hvítusunnudag og vistu ikki, at ferjurnar ikki sigla halgidagar*

**Eitt franskt par, sum hevur ferðast í Føroyum ta seinastu vikuna, mundu verðið ov sein til flogfarið til Aberdeen 2. Hvítusunnumorgun. Tey vóru støðd í Klaksvík 1. hvítusunnudag og sluppu ongan veg, tí Dúgvan siglir ikki halgidagar. Hetta varð ongantíð upplýst teimum**

SUMMARGESTIR
*Solby A. Eliasen*

Lítil og ongin ivi var um, at tey bæði, harra og frú Houllier úr Biarritz í suður-Fraklandi, gjørdust eitt sindur skelkað, tá tey 1. hvítusunnumorgun, fingu boðini um, at Dúgvan ikki sigldi, tí tað var halgidagur. Tað høvdu tey ikki fingið at vita frá nakrari føroyskari ferðamannaskrivstovu, og tískil vórðu tey strandað í Klaksvík 1. hvítusunnudag. Atlantic Airways hevði tilrættislagt teirra túr, og tey høvdu fingið eitt fullført yvirlit yvir møguleikar og hentleikar í Føroyum. Men ein sera týdningarmikil upplýsningur lá tó eftir. Ongin hevði sagt teimum, at ferjurnar í Føroyum ikki sigla 1. hvítusunnudag, og tískil høvdu tey bert halvan annan tíma frá tí, at tey komu til Leirvíkar 2. hvítusunnumorgun til flogfarið hjá teimum fór avstað.

Tey liðu tó onga neyð sum so 1. hvítusunnudag, tí tey fóru á Sjómansheimi í Klaksvík at búgva eina nátt, men tey undrast yvir, at tey ikki hava fingið nakað at vita.

Flogfarið hjá teimum skuldi flúgva klokkan 9:20 2. hvítusunnumorgun, og tey sluppu ikki úr Klaksvík fyrr enn klokkan 7:15, og tað vil siga, at tey høvdu hálvananna tíma úr Leirvík til flogfarið fór.

– Eg havi fingið at vita, at eg skal standa á ferjulegguni í morginárini klokkan sjey og so koyra skjótt, greiðir harra Houllier frá. Men hann ristir samstundis við høvdinum og sigur, at tað kann hann jú ikki, tí hægst loyvda ferð er 80 kilometrar um tíman.

– Vit hava fingið eina fullførda ferðaætlan frá Atlantsflog, men tað stendur onki um hendan halgidagin, har ongin ferja siglur og alt er stongt, sigur hann og leggur dent á, at tað er ábyrgdin hjá flogfelagnum og ikki teirra.

– Hvussu kundu vit vita tað, tá ongin hevur sagt okkum tað, spyr hann, meðan hann og kona hansara njóta ein góðan døgurða á Klaksvíkar Sjómansheimi.

Tað er ikki ov nógv sagt, at tey stúra eitt sindur fyri, um tey munnu fara at náa tað ella ikki, tí allatíðina meðan tey tosa um heimferðina venda tey aftur til, um tey náa flogfarið.

## Vakurt land

Tey bæði komu til Føroyar fyri átta døgum síðani, og tey hava ferðast kring oyggjarnar við leigaðum bili.

Teimum dámar sera væl Norðurlondini, og tey hava verið bæði í Íslandi, Norra og Svøríki. Tey hoyrdu um Føroyar, tá tey vóru í Íslandi í fjør. Tey komu í samband við eina føroyska kvinnu, sum greiddi teimum frá Føroyum og gav teimum ein faldara. Heimafturkomin til Fraklands fór harra Houiller út á internetið, og har fann hann heimasíðuna hjá Atlantsflogi. Hann setti seg í samband við tey, og tey tilrættisløgdu so allan túrin fyri tey. Útferðir, gisting, bil og sjálva ferðina til Føroyar. Tað lata tey sera væl at, og tað einasta minussið við túrinum var henda keðiliga hendingin 1. hvítusunnudag.

Tey bæði ferðast nógv, og teimum dámar best at ferðast til lond, har tað ikki er so heitt. Og harafturat dámar teimum best at ferðast á tann hátt, at tey sjálvi gera av, hvat tey gera, og hvar tey fara.

– Føroyar eru eitt avbera vakurt land, sigur frú Houllier. Henni dámar sera væl skandinaviskan litteratur. Hon hevur lisið nógvar ymiskar bøkur, sum norðurlendskir rithøvundar hava skrivað.

– Her er so friðarligt allastaðni, og børnini tykjast at vera so glað og lukkulig, siga tey bæði, og tey eru á einum máli um, at hetta er eitt gott pláss fyri børnum at vaksa upp í. Eisini halda tey, at føroyingar eru so blíðir. Tey hava hitt mong fólk, og fyrstu dagarnar undraðust tey ikki sørt á, at fólk heilsaðu teimum, hóast tey eru útlendsk.

– So at siga øll, sum vit hava møtt, hava heilsað upp á okkum. Onkur hevur stegðað og tosað, meðan onnur bara hava givið eitt nikk og sagt góðan dag.

Fyrsta dagin vóru tey í Tórshavn, síðani gekk leiðin inn í Eysturoynna, har tey gistu á hotel Eiði í nakrar dagar. Har nýttu tey serliga høvi til at fara gongutúrar í náttúruni, men veðrið hevur ikki reiðiliga verið við teimum.

– Tað letur til, at veðrið í Føroyum altíð er gott um kvøldið, halda tey bæði og smílast við.

Ein onnur orsøk til, at tey gingu meira, var verkfallið. Tað bar ikki so væl til hjá teimum at fáa brennievni til bilin, so tey royndu at ganga sum mest.

Teir seinastu dagarnar búðu tey á hotel Norð á Viðareiði, og so skuldu tey eftir ætlan fara úr aftur Klaksvík sunnudagin vestur í Vágarnar.

– Vit høvdu ætlað okkum ein túr undir Vestmannabjørgini á veg vestur, men tað verður so av ongum á hesum sinni. Tað gerst ikki við, sigur harra Houllier og yppir øksl, meðan kona hansara hyggur út gjøgnum vindeygað á Sjómansheiminum eftir tveimum kapp-róðrarbátum, sum fara inn eftir vágni.

– Mín sann er hetta eitt vakurt land, sum tit búgva í. Fjøll og sjógvur – tað fær illa verðið betur, sigur hon smílandi.

Tað er ikki eydnast okkum at finna út av, um tey bæði náddu flúgvarin, men tað hava tey helst. Hálvur annar tími úr Leirvík til flúgvarin fer, er ikki nógv, men tað gongur, siga onnur, sum ofta koyra ímillum. So er bara at vóna, at tey bæði, harra og frú Hollier, koma heim í øllum góðum. Tey verða heima í Biarritz hósdagin.

Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa eina viðmerking frá Atlantic Airways, áðrenn evsta mark.



# Eitt tilafturskomið land fyri brekað

**Tað er heilt galið við umstøðunum fyri brekað í Føroyum, heldur útisetin Bjørg Høgnesen, sum hevur ein brekaðan son. Hon hevur júst ferðast í Føroyum við einum skúlaflokki, og ferðalagið er skelkað av viðurskiftunum. Beinleiðis lóggáva og eitt handikappráð fyri hvørja kommunu, kundu bøtt um støðuna, heldur hon**

ÁR TEIRRA BREKAÐU
*Ingi Rasmussen*

Føroyar eru eitt tilafturskomið land hjá brekaðum.

Tað er keðiliga niðurstøðan hjá Bjørg Høgnesen, sum býr í Svøríki.

Ár teirra brekaðu er aftur á skránni í Føroyum og aðrastaðni. Seinast var í 1981, men hetta tíðarskeiðið er munandi meiri hent á økinum hjá øðrum tjóðum, staðfestir Bjørg Høgnesen, sum er úr Leirvík.

Bjørg er útbúgving heilsusystir og starvast í løtuni á einum skúla í Malmø. Hon flutti til Svøríkis í 1985 og hevur júst ferðast í Føroyum við einum skúlaflokki. Flokkurin varð skelkaður um umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum. Ferðalagið taldi trý vaksin og tíggju børn, teirra millum brekaði sonur hennara, Karl, sum er 13 ár.

– Vit hava ferðast í Føroyum á hvørjum ári í 13 ár. Og eg má siga, at Føroyar eru at sammeta við eitt menningarland, tá tað kemur til rørslubrekað og teirra umstøður, sigur Bjørg Høgnesen.



*Bjørg Høgnesen og sonurin Karl hava verið og ferðast í Føroyum saman við hansara floksfeløgum. Tað hevur verið eitt knoss, tí umstøðurnar fyri brekað eru so vánaligar*

*Mynd: Jan Müller*

## Eitt trappuland

Tað er serliga møguleikin at ferðast og koma fram í Føroyum, sum hon heldur vera út av lagi vánaligan.

– Tað er púra ørt at koma fram. Allastaðni eru trappur, hvar tú so kemur og fert. Allastaðni. Umborð á báti, í bussi og tú sleppir nóg illa á eina matstovu ella inn í ein handil. Ert tú rørslubrekaður og skalt við ferjuni til Klaksvíkar, næststørsta býin í Føroyum, noyðist tú at velja ímillum at vera knossaður upp ígjøgnum trappurnar ella at sita á bildekkinum sum viðføri millum farm og bilar. Tað er mannminkandi, sigur Bjørg Høgnesen.

Sonur hennara Karl hevur eina sjáldsama ryggsjúku, sum ger, at hann noyðist at hava korsett um allan ryggin. Alt samdøgrið, alt árið. Ryggurin er boygdur, hann er veikur í liðunum og fær ikki gingið langt. Høvdinum er einki galið við. Tvørturímóti.

– Hann noyddist at grulva upp trappurnar sjálvur, meðan fólk sóu. Hann veit, hvussu hansara støða er, og hann vil ikki berast allaðstaðni. Tað snýr seg um persónligan integritet. Hann er í einum aldri, har hann vil sjálvur. Vit hava latið hann, og samstundis vísir hann okkum, hvussu galið stendur til í Føroyum, sigur Bjørg Høgnesen.

## Lítil bati

Tosað hevur verið um trupulleikan í nógv ár, og smávegis batar henda her og har, tí tað eru fólk, sum hugsa um brekað. Men yvirhøvur er lítið og onki hent í Føroyum, hesa tíðina hon hevur verið búsitandi í Svøríki, heldur Bjørg.

Eg haldi, at tey, sum sita og arbeiða við hesum, tey, sum ráða, og tey, sum hava pengarnar um hendi, skuldu ikki sloppið við at sitið á einum kontóri. Tey skuldu farið niður í ein koyristól, farið ein túr umborð á Dúgvuna ella í ein buss, verið hálað upp og niður av fremmandafólki, so kanska tey høvdu skilt, hvussu illa tað er statt í Føroyum í hesum harrans ári fyri brekað. Ikki fyrr enn tú hevur roynt tað sjálvur og hevur verið noyddur at biðið fleiri fólk hjálpa tær, skilir tú støðuna. Tað nyttar onki at koma við einum pappíri og halda seg vita alt, sigur Bjørg Høgnesen.

Tað er víðagitna hugburðinum, tað er galið við.

– Tað er ikki komið so langt, at tey brekaðu eru ein integreraður partur av gerandisdegnum. Tíverri. Brekað fólk eru ikki borgarar sum onnur. Tey eru ikki líka fyri samfelagnum. Helst halda øll, at tey eru tað, men tað verður ikki víst í verki, tí alt ov nógvar forðingar standa í vegin fyri teimum. Tey eiga at sleppa at røra seg frítt sum vit onnur. Táðstaðni vísa vit rættiliga, at vit meina tað, sigur Bjørg.

## Lógir og ráð

Tað skal í grundini ikki so nógv til, at tað verður nógv frægari, er boðskapurin hjá Bjørg Høgnesen. Ein háttur at koma víðari er at hyggja at, hvussu útlond hava gjørt.

Tað byrjar við politiska myndugleikanum, tí lógir siga, hvat samfelagið vil.

– Í Svøríki eru lógir, sum siga, at viðurskiftini hjá brekaðum skulu vera í lagi. Lyftir skulu vera, har fólk ferðast, um tað er neyðugt. Og tað er lóg fyri, hvussu almenna ferðslan og almenn støð eru innrættað. Italia er eitt undangonguland – eitt paradís fyri brekað. Har er lóg, sum sigur, at brekað skulu koma fram allastaðni, og tí eru ongar forðingar. Og um tað ikki er framkomandi, fær tann, sum hevur ábyrgdina, fúlar bøtur, sigur Bjørg Høgnesen.

Kanska er størsti trupulleikin tann, at tað ikki eru brekað sum ráða. Eitt gott amboð at koma hesum missmuni til lívs er at stovnseta handikappráð, sum skal takast upp á ráð í øllum lutum.

– Eg haldi avgjørt, at tað skuldu verið handikappráð, sum tað er í øðrum londum. Í Svøríki er eitt fyri hvørja bygd, og í Føroyum kundi verið eitt fyri hvørja kommunu. Eitt slíkt ráð verður tikið upp á ráð, hvørja ferð okkurt nýtt verður bygt, ella týðandi avgerðir verða tiknar, sum ávirka brekað, sigur Bjørg Høgnesen.

## Krev tín rætt

Í triðja lagi heldur Bjørg, at tað hevur stóran týdning, at tey brekaðu krevja sín rætt. Í so máta eru føroyingar kanska í so friðarligir og lata ov nógv um seg ganga.

– Aðrastaðni eru fólk kanska meiri krevjandi. Tey standa fram og gera krav upp á sín rætt at liva sum onnur. Tey síggja tað sum ein sjálvsagdan rætt at koma og fara, sum teimum lystir, sigur Bjørg.

Hon nevnir dømi um eina gentu í Malmø, sum ikki slapp við bussinum. Hvønn morgun fekk hon systrina at hjálpa sær at stilla seg framman fyri bussin, so hann ikki slapp avstað. Søgan frættist, kom í fjølmiðlarnar, og trýst varð lagt á myndugleikarnar, sum bøttu um viðurskiftini.

## Pengar eru til

Tá samanum kemur, er alt ein spurningur um pengar. Men tað eigur ikki at vera ein forðing, tí hetta snýr seg meira um eina støðutakan enn stórar upphæddir.

– Pengar eru til. Tað er bara ein spurningur um, hvar tú setir teir, og hvørjum tú tekur teir frá. Tað er ein spurningur um raðfesting, sum politikkur altíð er. Í Svøríki og aðrastaðni er hetta ein fastur táttur í politikki. Eg skilji ikki, hví pengar bara mangla, tá okkurt skal gerast fyri brekað, tí tey eru eisini borgarar, sigur Bjørg Høgnesen.

Sjálvandi kostar tað at gera batar, viðgongur hon, men tað at gera eina rampu við eina trappu er í sjálvum sær ikki dýrt. So tað snýr seg aftur um hugburð, og hann kann ávirkast við lóggávu.

– Tað snýr seg um at gera tey brekaðu til ein sjálvsagdan og integreraðan part av samfelagnum. Tí tey hava eisini krav upp á lívsgóðsku eins og øll onnur, staðfestir Bjørg.

Í juli mánað kemur hon aftur til Føroya við einum blandaðum ferðalagi, har fólk hava ymisk brek. Hon stúrir.